Greið boð frá rækjuvinnuni:

# Bjargingin skal koma frá almennari síðu

**Formaðurin í felagnum Rækjuskip sigur støðuna hjá rækjuskipunum vera sera hættisliga. Sambært honum verður neyðugt hjá landskassanum at veita stuðul á ein ella annan hátt. Serliga saknar hann, at tað almenna hjálpir við at fáa rækjuflotanum røttu kvoturnar**



*Formaðurin í Felagnum Rækjuskip, Jákup Egholm Hansen, heldur, at ein bjarging má koma frá almennari síðu*



*Støðan hjá rækjuskipunum tykist at vera sera hættislig í løtuni.*

VINNA
*Heri á Rógvi*

Støðan hjá rækjuflotanum tykist at vera rættiliga hættislig. Hetta er kanska heldur ikki nakað nýtt. Leingi hevur verið tosað um hægri oljuprísir og lægri søluprísir. Støðan hjá føroyska rækjuflotanum, eins og flotanum aðrastaðni, tykist at vera kreppukend og hættislig. Rækjuflotin gav í fjør hall, og tað tykist ikki sum um, at gongdin er vend nakað munandi.

Bjarningin skal eftir øllum at døma koma frá landskassanum á ein ella annan hátt. Formaðurin í felagnum Rækjuskip, Jákup Sólstein, sær fleiri møguleikar at bjarga kreppuraktu vinnuni, og hesir hava allir tað til felags, at teir fara at merkja inntriv frá almennari síðu.

Rækjuflotin telur í dag 12 skip, og einir 300 menn sigla við skipunum. Tað er einamest við Flemmish Cap, at føroysku rækjuskipini royna.

## Olja og prísir

Jákup Egholm Hansen kallar støðuna hjá rækjuflotanum fyri kreppu. Hann sigur, at kreppan skyldast ov lágar rækjuprísir og ov høgar oljuprísir. Hetta merkir, at skipini í dag ikki fáa tað til at mæla runt fíggjarliga. Sum dømi vísir hann á, at prísirnir í 1993 vóru 150 kr./kg, men teir liggja í dag um 40 kr./kg. Samstundis eru oljuprísirnir farnir heilt nógv upp, og hetta ger m.a., at summi skip skulu gjalda einar 4 milliónir meira í útreiðslum til olju, og hetta merkir aftur, at fiskast skal fyri einar 12 milliónir meira, og hetta ber stutt sagt ikki til.

-Tað hevur frá politiskari síðu verið víst á, at prísurin á rækjum er farin upp aftur, men er somikið lítið, at tað ger bert undirskotið minni, og hetta ger ikki, at vinnan nú kastar pengar av sær, sigur Jákup Egholm Hansen.

Í løtuni eru 12 rækjuskip í flotanum, og øll teirra geva undirskot, greiðir Jákup Egholm Hansen frá.

Hann sigur eisini, at oljuprísirnir nú eru komnir í eina meira fasta legu, men hetta er framvegis ein sera stór útreiðsla fyri skipini.

## Betri møguleikar

Omanfyri nevndu umstøðurnar, sum fyri tíðina kosta rækjuflotanum dýrt, eru alt umstøður, ið vinnan sjálv ikki hevur teir stóru møguleikararnar at gera nakað stórvegis við.

Skal rækjuflotanum í framtíðini vera lív lagað, ella í øllum betra um støðuna, so merkir hetta, at landsmyndugleikararnir, sambært Jákupi Egholm Hansen, mugu gera okkurt mungagott.

Jákup Egholm Hansen vísir m.a. á, at veiðimøguleikarnir ikki eru nóg góðir. Her verður serliga sipað til, at teir ikki sleppa framat nóg nógvum kvotum í Grønlandi. Tær kvoturnar, sum teir sleppa til í Grønlandi, eru kvotur, teir sjálvir hava goldið fyri, og hetta er eisini rættiliga dýrt. Higartil hava føroysk rækjuskip brúkt einari 17 mío. fyri at sleppa at fiska í Grønlandi.

-Tað almenna kundi farið inn og keypt kvotur í Grønlandi. Tað ber bæði til at gjalda við pengum og við at fiskirættindi afturfyri. Á henda hátt spardu reiðaríini í øllum førum 17 mío., og hetta er nakað, sum fer at merkjast, Jákup Egholm Hansen.

Eisini nevnir møguleikar við FAS-skipanina, sum skal vera eitt slag av einari afturberingarskipan.

-Tað er alt ov lítil politiskur áhugi fyri rækjuflotanum, sigur Jákup Egholm Hansen.

Hann vil tó ikki siga nakað um, hvussu leingi skipini framvegis kunnu yvirliva, men hann leggur áherðslu á, at støðan bæði hevur verið og er hættislig.

Heini O. Heinesen:

# Heldur einki um at stuðla

**Heini O. Heinesen, tingmaður fyri Tjóðveldisflokkin, heldur einki um at fara inn at stuðla rækjuskipunum, tá ið vit hava havt sera ringar royndir av tílíkum virksemi**

VINNA
*Heri á Rógvi*



*Heini O. Heinesen sær ein stóran vanda í at stuðla fiskivinnuni sum heild.*

Heini O. Heinesen er formaður í Vinnunevndini hjá løgtinginum og samstundis eisini formaður fyri tingbólkin hjá Tjóðveldisflokkinum.

Hann kennir eisini til støðuna hjá rækjuskipunum, og hann hevur merkt, at støðan hevur hættislig yvir eitt longri áramál.

Hann undirstrikar, at tað nyttar einki at tveita pengar eftir nøkrum, sum mann allíkavæl ikki hevur greiðu á.

Hann sigur somuleiðis, at hvørki Vinnunevndin ella Tjóðveldisflokkurin hava havt hetta mál til viðgerðar.

Hann sigur, at landið hevur roynt at bjarga skipunum fyrr, men hetta var tað sama sum at tveita pengarnar út ígjøgnum vindeyga. Hann sær sum heild ein ógvuliga stóran vanda við at fara inn við studningi.

-Vit mugu staðfesta um hetta eru áhaldandi trupulleikar ella tíðaravmarkaðir trupulleikar. Tað nyttar einki at fara út at tveita pengar eftir vinnuni, tá ið tað skal vera líka fyri øll, og hetta loysir í øllum førum einki, greiðir Heini O. Heinesen frá.

Heini O. Heinesen undrast eisini yvir, at tað er so stórur áhugi fyri at gera íløgur í rækjuflota.

Hann vísir somuleiðis á, at hóast hann var við til at samtykkja lógina, so hevur lógin um 15 % frádráttin til fiskimenn ikki givið rækjuskipunum nakran fyrimun, tá ið teir bestu menninir kanska hava leitað sær aðrar leiðir.

Heini O. Heinesen sigur seg ikki hava nakað boð upp á, hvussu myndugleikarnir kunnu skapa betri karmar fyri rækju skipini.

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður:

# Vit gera tað vit kunnu

**Jørgen Niclasen, landsstýrismaður við fiskivinnumálum, heldur at landsins myndugleikar gera alt tað, teir eru førir fyri, tá tað snýr seg um at skapa karmar fyri rækjuskipunum. Hann talar harðliga ímóti nøkrum slag av beinleiðis stuðli**

VINNA
*Heri á Rógvi*

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður, kennir til, at rækjuskipini eru illa fyri í løtuni, og samstundis eisini hava verið rættiliga illa fyri í longri tíð.

Hann vísir á, at teir hava roynt at fáa til vega so góð kvotarættindi sum møguligt. Samstundis ásannar hann, at tað ikki er serliga lætt at fáa allar tær kvoturnar, sum teir ynskja sær.



*Jørgen Niclasen sigur seg gera tað, hann megnar fyri at hjálpa rækjuskipunum.*

Hann vísir á, at rækjuskipini hava fingið nýggjar møguleikar, eitt nú í Grønlandi, har tað er vorðið møguligt at keypa fiskirættindi. Hann vísir somuleiðis á, at teir hava roynt at samrátt seg til fiskirættindi undir Grønlandi, men tað hevur ikki eydnast higartil. Føroyingar eiga í løtuni eina kvotu undir Grønlandi, men hon er fingin til vega gjøgnum eina avtalu við ES.

Jørgen Niclasen leggur áherðslu á, at teir royna at skapa góðar karmar fyri rækjuskipini, men beinleiðis studningur er ikki nøkur gongd leið. Gongdin í nýtiárunum hevur eisini verið beint ímóti at veita nakað slag av almennan studningi.

Hann heldur ikki, at loysnin skal vera gjøgnum FAS-skipanina, tá ið hetta ikki einans vil vera fyri rækjuskip.

Sum heild tykist tað sum um, at Jørgen Niclasen sær rættiliga optimistiskt upp á støðuna.

-Tað virkar sum um, at onkur sær vinning í rækjuvinnuni, tá ið áhugin fyri bæði skipum og loyvum tykist at vera til staðar, sigur Jørgen Niclasen.

Hann vísir eisini á, at enn liggur einki uppskot á borðinum hjá honum, um at koma rækjuflotanum til hjálpar.



# Nyrup í tvístøðu

**Poul Nyrup Rasmussen fer kanska longu í dag at taka avgerð um at skriva út nýval til Fólkatingið tann 20. november. Veljarakanningarnar eru góðar júst nú, men vandin fyri einum ósigri er sera stórur.**

*Magnus Dam*
*Keypmannahavn*

Søgurnar um nýval trívast altíð væl á Christiansborg. Veljarakanningarnar eru nógvar, og tær verða lisnar við stórum áhuga, tí ofta eru tað tær, sum siga mest um, hvørt val er í hondum.

Veljarakanningarnar hava ikki verið blíðar við donsku stjórnarflokkarnar seinastu árini. Danski Javnaðarflokkurin hevur verið heilt niðri á 20 prosentum í kanningunum, meðan Vinstra hevur ligið omanfyri 30 prosent. Nyrup hevur tí ikki sæð nakra orsøk til at fara út í eitt val, sum hann sá út til at tapa longu frammanundan.

Men vend er komin í síðani 11. september. Nyrup hevur verið stóra álitið hjá danska fólkinum í einari svárari tíð, og hetta løna tey honum aftur í nýggjastu veljarakanningunum. Fyri fyrstu ferð síðani seinasta val liggur danski Javnaðarflokkurin nú omanfyri 30 prosent í veljarakanningunum. Nyrup hevur tí funnið kalendaran fram at vita, um ein uppplagdur valdagur liggur fyri framman.

## Trý val í senn

Flestu eygleiðarar rokna við, at forsætisráðharrin fer at áseta valdagin til tann 20. november. Tá eru eisini býráðs- og amtsval, og nógv halda hetta vera ein upplagdan møguleika. Verður val 20. november, so er tað fyrstu ferð í søguni, at býráðs- og amtsval verða hildin sama dag sum eitt fólkatingsval.

Tað eru tey, sum halda, at býráðsvalið og valið til amtsráðini fara at detta burtur ímillum, um fólkatingsval verður sama dag, men tað eru eisini nógv, sum halda tað vera eitt gott hugskot. Frá baklandinum hevur Nyrup fingið grønt ljós til at skriva út val, nær tað skal vera. Borgarstjórarnir í stóru kommunum Keypmannahavn og ≈rhus, Jens Kramer Mikkelsen og Flemming Knudsen, taka báðir undir við hugskotinum, og tað sama ger formaðurin í Landsfelagnum hjá kommununum, Anker Boye, sum eisini er borgarstjóri í Odense.

## Í dag ella hósdagin

Forsætisráðharrin heldur vanliga tíðindafund fyrrapartin týsdag, og møguliga fer í dag at avdúka, um hann ger álvara av ætlanunum um nýval. Hinvegin er ikki fundur aftur í Fólkatinginum fyrrenn hósdagin, og møguliga bíðar hann við at avdúka, um val verður ella ikki, til tann dagin.

Nyrup sjálvur hevur higartil ikki viljað gjørt viðmerkingar til søgurnar um nýval. Á einum tíðindafundi sunnukvøldið lat hann hurðina standa á glopp og vísti ikki nøkrum aftur.

- Tað, sum hevur týdning júst nú, er at taka skilagóðar avgerðir í samband við stríðið móti yvirgangi og avgerðir, sum tryggja búskaparliga støðuna, nú støðan í heiminum annars er so óviss, segði Nyrup.

## Andstøðan er klár

Andstøðan sigur seg vera til reiðar at fara út í eitt valstríð nú, men teir Radikalu, sum sita í stjórnini saman við Nyryp, eru ikki til reiðar. Tað er Sosialistiski Fólkaflokkurin heldur ikki, og hann er týdningarmesti stuðulsflokkurin hjá stjórnini.

Sambært veljarakanningunum er stórur vandi fyri, at stjórnin saman við stuðulsflokkunum missur meirilutan, og at borgarligu flokkarnir vinna stjórnarvaldið. Eitt miðaltal av fleiri veljarakanningum vísir, at stjórnin við stuðulsflokkum fær 78 fólkatingslimir og borgarligu flokkarnir 97 sessir og sostatt greiðan meiriluta.

Sum gongdin hevur verið seinastu árini kann kortini vera, at Nyrup hugsar sum so, at útlitini fyri, at undirtøkan hjá stjórnini verður størri enn nú, eru sera smá. Stjórnin hevur fingið viðrák orsakað av yvirganginum í USA, men hetta er neyvan eitt varandi viðrák.

Í løtuni vigar Nyrup fyrimunirnar upp í móti vansunum, og í dag ella hósdagin fæst helst at vita, um hann sjálvur er til reiðar til eitt skjótt men uttan iva hart valstríð, sum skal avgera lagnuna hjá stjórnini.



*Poul Nyrup Rasmussen situr í hesum døgum og umhugsar at skriva út nýval til tann 20. november. Men vandi er fyri, at stjórnin missur stjórnarvaldið, og at Rasmussen verður avloystur av einum øðrum Rasmussen ñ Anders Fogh Rasmussen úr Vinstra.*

# -Teir hava dripið børn míni og mann mín!

**Sjey børn eru millum teirra, sum hava latið lív í seinastu amerkansku bumbuálopunum á Afghanistan, og mannarættindafelagsskapir átala harðliga amerikansku framferðina**

-Hvat skal eg gera? Teir hava dripið øll míni børn og mann mín.

Orðini eru frá einari kvinnu, sum syrgir síni sjey børn og mannin. Ein amerikansk bumba, sum var farin av leið, rakti ússaliga heim teirra í Kabul tíðliga sunnumorgunin.

Á einum horni situr ein maður um miðjan aldur og rurar einum smábarni. Barnið sæst næstan ikki fyri dusti, og maðurin fyrireikar seg til at balla tað í eitt plagg. Tí barnið er deytt.

Undir liðini á manninum liggja trý onnur børn, tveir dreingir og ein genta. Ein tíðindamaður hjá bretsku tíðindastovuni Reuters veit at siga, at tað elsta av børnunum var fimm ár. Tey verða ikki eldri, tí tey trý børnini eru øll deyð.

- Allur heimurin hevur skyldina av hesum sorgarleikinum. Hví verður hetta ikki steðgað, spyr ein mamma, sum einini hevur mist síni børn í álopinum í nátt.

Tann vilsta amerikanska bumban oyðilegði trý hús í einum fátækrabýlingi miðskeiðis í Kabul. Hetta var ein av teimum fýra bumbunum, sum raktu Kabul í lýsingini sunnumorgunin. Sambært tænastumonnum doyðu tólv fólk í álopinum.

Í bygdini Ghanikhel, sum er nakað norðan fyri Kabul, vóru amerikanararnir roknaðir sum hetjur, tí teir skuldu hjálpa Norðursamgonguni at reka Taliban burtur. Men nú eru amerikanararnir ikki hetjur longur, men heldur búrkroppar. Leygardagin tveitti eitt amerikanskt flogfar eina bumbu niður yvir bygdina. Ein ung kvinna doyði. Húsini, sum hon búði í, vórðu javnað við jørðina.

- Amerikanararnir koma higar og tveita bumbur niður yvir Afghanistan og drepa ósek fólk, segði ein islamskur leiðari, tá tann unga kvinnan fór til gravar sunnudagin

## Mótmælt í Pentagon

Mannarættindafelagsskapurin Human Rights Watch fýlist hvassliga á, at alt fleiri og fleiri sivilfólk doyggja í amerikansku bumbuálopunum á Afghanistan.

- Hesa seinastu vikuna hava vit sæð, at munandi fleiri sivilfólk ery deyð í álopunum, og hetta kunnu vit als ikki góðtaka, sigur Peter Bouckaert, sum hevur fingið til uppgávu at skráseta, hvussu mong sivilfólk lata lív í álopunum.

Human Rights Watch hevur biðið amerikanska verjumálaráðið Pentagon um at seta tiltøk í verk, so sleppast kann undan, at ósek sivilfólk verða rakt í álopunum.

Italskir hjálparfelagsskapir hava eisini mótmælt, at amerikansku álopini kosta so nógvum sivilfólkum lívið. Italsk hjálparfólk, sum eru har norðuri í Afghanistan, siga, at 16 sivilfólk doyðu, tá ein amerikansk bumba rakti eina bygd har leygarkvøldið. Talsmenn hjá Norðursamgonguni, sum hevur valdið á hesum leiðum, hava váttað álopið.

**(Fartekst)**